**LANDSROYND 6. FLOKKUR**
**MAI 2008**

# Náttúra og tøkni

**60 minuttir**



*Mýrisnípuungi. Mynd: Regin Ellingsgaard*

| | |
|---|---|
| Navn: | Flokkur: |
| Skúli: | Lærari: |

**Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Um tað er ein uppgáva, sum tú ikki dugir, far so víðari. Tú kanst skriva við blýanti.**

# Mannakroppurin

Set striku til røttu gøgnini.



Magi

Tarmar

Hjarta

Lunga

Livur

Hvørt av hesum gøgnum hevur sína uppgávu. Vel trý av omanfyri nevndu gøgnum og greið frá, hvørja uppgávu tey hava.

1. ______________________________

______________________________

2. ______________________________

______________________________

3. ______________________________

______________________________

*Tekning: Sólgerð Andreassen.*

# Matpakkin

Ein góður og sunnur matpakki hevur týdning fyri teg.

Legg sunnan mat í matpakkan. Set striku til matpakkan.




Tín matpakki

*Tekning: Sólgerð Andreassen.*

# Plantur

**Vit býta eina plantu í 4 høvuðspartar:**
**Set strikur millum orð og mynd:**



Blað

Leggur

Rót

Blóma

Hvørja uppgávu hevur:

1. Blóman ______________________________

______________________________

2. Leggur ______________________________

______________________________

3. Blað ______________________________

______________________________

4. Rót ______________________________

______________________________

*Mynd úr: "Lív og gróður", Føroya Skúlabókagrunnur.*

## Skriva navnið á plantuni:













*Mynd úr: "Lív og gróður", Føroya Skúlabókagrunnur.*

# Súgdjór

1. Hvat hava øll súgdjór til felags, í mun til onnur djór?

2. Hvalur er býttur í tveir høvuðsbólkar, hvørjar?

3. Hvør er høvuðsføðin hjá grindahvali?

4. Hvussu veit hvalur, hvat er frammanfyri?

5. Nær eru flestar grindir í Føroyum? Set kross við.

   Vár Summar Heyst Vetur

6. Hvat tól verður sett á hval, tá ið vit kanna, hvar hann svimur, kavar o.a.?

7. Nevn fýra hvalasløg

8. Tvey kópasløg halda til í Føroyum, hvørji eru tey?

9. Bara annar leggur í Føroyum, hvør?

# Fiskivinna

Hesi skip eru í føroyska fiskiflotanum. Hvat slag eru tey?

Set striku ímillum orð og mynd.

Nótaskip　　　　Trolari　　　　Línuskip





*Myndir úr bókini"Náttúra og tøkni 3", Føroya Skúlabókagrunnur.*

Set navn á









*Myndir úr bókini "Náttúra og tøkni 3", Arbeiðsbók, Føroya Skúlabókagrunnur.*

# Jørðin




1. Hvussu leingi tekur tað mánanum at koma einaferð kring jørðina?

---

2. Hvussu leingi tekur tað jørðini at mala einaferð um seg sjálva?

---

3. Hvussu leingi tekur tað jørðini at mala einaferð um sólina?

---

4. Hvat ávirkar havið, so vit fáa flóð og fjøru?

---

5. Hvussu eitur heiti streymurin kring Føroyar?

---

6. Hvussu eru Føroyar vorðnar til?

---

7. Hvat grótslag hava vit mest av í Føroyum?

---

*Mynd úr: "Náttúra og tøkni 3", Arbeiðsbók, Føroya Skúlabókagrunnur.*

# Føðiketa

Tekna pílar, sum vísa, hvør etur hvønn.


Djóraæti


Fiskayngul


Grindahvalur


Algur


Høgguslokkur

Hvør er fyrsti liður í hesi føðiketuni?

---

Hvør liður er menniskja í eini føðiketu?

---

Hvat er ein føðiketa?

---

*Myndir úr: "Náttúra og tøkni 3", Føroya Skúlabókagrunnur.*

# Lufttrýst

Sólin skínur. Greið frá, hvat pílarnir vísa, og hvat hendir á myndini.

______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________



*Mynd úr: "Náttúra og tøkni 2", Føroya Skúlabókagrunnur.*

# Kennir tú ættirnar?

Fótbóltslandsliðið skal í komandi kapping spæla ímóti hesum londum:
Litava, Eysturríki, Rumenia, Fraklandi og Serbia.

Tú skalt ein túr við Atlantsflog at vitja londini. Men fyri at koma á rætt stað, mást tú kenna ættirnar. Norðan er merkt á kortinum.

Fyrst flúgva tit úr Føroyum til Danmarkar.

Hvørja ætt skulu tit fara? ___________.

Síðan flúgva tit í ein eystan.
Landið eitur _____________________.

So flúgva tit í ein sunnan.
Landið eitur _____________________.

Nú fara tit í ein vestan.
Landið eitur _____________________.

Tit flúgva í ein útnyrðing og koma til _________________________________.

So fara tit aftur á flog vestureftir.
Landið eitur ______________________.

Áðrenn tit fara heimaftur, verður farið til Danmarkar.

Hvørja ætt skulu tit flúgva ___________.

Heim til Føroyar fara tit í ein _________.

